# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli

## Onnur av trimum framsýningum í Smiðjuni

Í døgunum frá 8. til 20. februar 2005 skipar Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli fyri trimum framsýningum undir heitinum »Spírandi list« í Smiðjuni í Lítluvík.

Leygardagin 12. februar lat onnur framsýningin upp í Smiðjuni.

Opið er soleiðis: Leygardagin 10-18, sunnudagin, 15-18, mánadag - mikudag 12-18

Næmingarnir ganga á Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla í Havn og í Kollafirði.



*Tey sum sýna fram í Smiðjuni. f.v. Eigil Lyngsø, Havn, Trygvi F. Guttesen, Havn, Louisa A. Fjallsbak, Havn, Anna Hansdóttir, Havn, Charlotta Rasmussen, Funningsfjørður, Ólavur Thomsen, Havn, og Randi Gunnarsdóttir, lærari, úr Havn*

*Hesi vanta á myndini: Anna Maria Nyby, Havn, Hans Poulsen, Havn Heidi Joensen, Havn, og Ingrid Gregersen úr Klaksvík*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Teir skoða verkið



LIST
*Snorri Brend*

Veðrið var ikki av tí besta, men tað helt kortini ikki tveimum listakønum monnum aftur í at fara út úr bilinum eina løtu.

Seinnapartin leygardagin hittust listamaðurin, Hans Pauli Olsen og Helgi Fossádal, nýggjur listarligur leiðari í Listasavninum.

Teir skoðaðu eitt av mongum verkum hjá Hans Paula – standmyndina »Fría Fríða« sum varð avdúkað í juni mánaði í fjør. hon stendur á tí vakra økinum nærhendis Skansanum í Havn.

Hans Pauli er í Føroyum í løtuni í samband við annað arbeiði.

Teir báðir hava helst mangt at práta um.

## Maersk varð til Antares

Frítíðarfelagið »Føroyskir Mærsk Siglarar« hevði ársaðalfund á Føroya Sjómansskúla leygardagin 12. februar.

Á aðalfundinum var millum annað ásetan av navni og búmerki til felagið á skránni.

Í fjør var navna og búmerkjakapping útskriva ímillum limirnar og komu fýra uppskot til navn og búmerki inn.

Aðalfundurin samtykti at taka eitt av innkomnu uppskotunum, og hevur Felagið nú broytt navn til Frítíðarfelagið Antares.

Somuleiðis hevur Felagið fingið búmerki, sum ímyndar navn felagsins og eina kumpassrósu í føroyskum litunum

Eisini var nýggj nevnd vald á fundinum og hevur nývalda nevndin skipa seg við Meinhard Jacobsen sum formanni, Andras S. Gregersen og Jørgen F. Andreasen sum næstformonnum, Thomas Lambastein sum roknskaparleiðara og Martin Frederiksen sum skrivara.

Frítíðarfelagið Antares, hvørs endamál er at røkja felags áhugamál, hjá teimum føroyingum, ið starvast A.P. Møller – Mæarsk A/S, var stovna seinasta summar, og hevur í dag góðar 100 limir.

## Siga frá søgum í Føroyum

NORÐURLANDA-HÚSIÐ
*Snorri Brend*

Eitt av málunum á stýrisfundinum í Norður-landahúsinum í farnu viku var ein spennandi ætlan, sum verður í Føroyum í næstum.

Hetta er ein ætlan, sum upprunaliga er sett í verk av ST-stovninum UNESCO. Sum ein part av víttfevnda arbeiði sínum arbeiðir stovnurin eisini við at menna kynstrið at siga frá søgum.

- Hetta er nakað sum er horvið í mongum londum, men hetta finst enn her í Føroyum. Tað mugu gera alt fyri at varðveita her, sigur Niels Halm, stjóri í Norðurlandahúsinum.

Ætlanin er her at fara inn í eitt samstarv við m.a. Rithøvundafelagið og Grímu um at skipa fyri hesum tiltakinum, sum kallast "World Storytelling" og sum verður fyriskipað í næsta mánaði.

Ætlanin er at fáa søgufróð fólk úr Danmark at koma hendavegin í sambandi tiltakið. Hesi kunnu so saman við fróðarfólkið her, tosa saman um, hvussu vit kunnu varðveita hetta serstaka kynstrið í framtíðini.

Sosialurin

Lesið Sosialin
-tað loysir seg!